# Tjóðbankin ávarar um ovurhiting

**Fíggjarmálaráðið og Tjóðbankin eru á somu kós, tá ið tað snýr seg um heildarmyndina av føroyska búskapinum. Í nýggjari frágreiðing staðfestir Tjóðbankin, at føroyski búskapurin »koyrir í hægsta geari«**

*Tíðindaskriv frá Fíggjarmálaráðnum*

Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, frøðist um, at samsvar er millum útmeldingarnar frá Fíggjarmálaráðnum og nú frá danska Tjóðbankanum.

Tjóðbankin staðfestir í frágreiðing sínari fyri 3. ársfjórðing 2007, at ”Det stigende handelsbalanceunderskud og den meget lave arbejdsløshed er klare signaler om, at økonomien kører i højeste gear. Med den store mangel på arbejdskraft ville det give god mening, at kommunerne og landskassen holder igen med yderligere udgiftsvækst i de kommende år”.

Samstundis metir Tjóðbankin, at “De senere par års betydelige underskud på handelsbalancen har sandsynligvis bragt saldoen på betalingsbalancens løbende poster i underskud.”

Nýggjasta frágreiðingin frá Tjóðbankanum er fult í tráð við tað, Fíggjarmálaráðið hevur fráboðað seinastu mánaðirnar um ovurhiting í búskapinum, møguligum halli á gjaldsjavnanum og tørvin á arbeiðsmegi.

”Ójavnarnir, Fíggjarmálaráðið hevur víst á, verða staðfestir í nýggjastu frágreiðingini frá Tjóðbankanum. Samstundis metir Tjóðbankin eisini, at land og kommunur eiga at reka ein tálmandi búskaparpolitikk fyri ikki at skunda undir ovurhitaða búskapin”, staðfestir Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Samstundis sum landsstýrismaðurin frøðist um, at frágreiðingin er eitt tekin um, at búskaparpolitikkurin er á góðari leið, harmast hann um, at tað ikki hevur eyðnast at tálma ovurhitingini meiri á verandi fíggjarlógaruppskoti.



*Ávaringin frá Tjóðbankanum er guff fyri Magna Laksáfoss, landsstýrismann í fíggjarmálum, sum í nógvar mánaðar hevur ávarað um just tað sama*

*Savnsmynd*

STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

**Læknaskrivari til Skurðdepilin**

Ert tú læknaskrivari og hevur hug til at arbeiða í einum spennandi, tvørfakligum umhvørvi, so er hetta møguliga nakað fyri teg.

Eitt fast starv á starvsbrøki 0,75 er leyst at søkja til setan 15. januar 2008 ella eftir aftalu.

Læknaskrivaraarbeiðið á Skurðdeplinum umfatar: Ortopedi, Parenkymkirurgi, Urologi, Plastikkirurgi, Gyn./obs., ONH og Eygnadeild.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og avbjóðandi starv, har tú kemur at seta tín dám á arbeiðsøkið, og saman við verandi læknaskrivarum at virka fyri einum høgum tænastustøði. Upplæring verður givin í teimum telduskipanum, sum verða nýttar.

**Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, so sum:**
- verða virkin partur av nýggju Talgildu Heilsu Skipanini
- skriva journalir
- avgreiða fyrispurningar frá sjúklingum
- ymsar umsitingarligar uppgávur
- verða við til at útbúgva læknaskrivaranæmingar

**Vit ynskja ein læknaskrivara, ið:**
- hevur læknaskrivaraútbúgving
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- hevur góð samstarvsevni
- tolir broytingar
- hevur teldukunnleika

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Óluvu Dalsgarð, læknaskrivara, lokal 5123.

**Umsóknarfreistin er 12. desember 2007**

**Onnur størv** – sí meira á www.lsh.fo

**Starvsfólk til Vekslaran**
Umsóknarfreistin er 19. november 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B8**
Umsóknarfreistin er 19. november 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til E2**
Umsóknarfreistin er 19. november 2007 kl. 12.00

**Leiðari til viðgerðareindina »Daglonirnar« á Psyk. (endurlýsing)**
Umsóknarfreistin er 20. november 2007 kl. 12.00

**Leiðandi yvirlækni til Medisinska depilin**
Umsóknarfreistin er 22. november 2007

**Ljósmóðir**
Umsóknarfreistin er 23. november 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar/heilsurøktari/pleygari til Psyk. D1**
Umsóknarfreistin er 23. november 2007 kl. 12.00

**Námsfrøðingur til Barnadeildin B5**
Umsóknarfreistin er 26. november 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til A2**
Umsóknarfreistin er 26. november 2007

**Radiografur/røntgensjúkrarøktarfrøðingur**
Umsóknarfreistin er 4. januar 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo